FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 12. oktober 2021
J. nr.: 21/20167

Svar uppá fyrispurning nr. 46/2021 frá Frimodt Rasmussen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um lántøku til Eystur- og Sandoyartunlarnar.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landstýrismaðurin kannað møguleikan at umfíggja lánsavtaluna til Eystur- og Sandoyartunlarnar?
2. Eru ætlanir um at kanna møguleikan at umfíggja tunlarnar?
3. Er nøkur forðing fyri at umfíggja tunlarnar?

Svar:

Til nr. 1 og nr. 2
Landsstýrið hevur lagt verkætlanina Eystur- og Sandoyartunnilin til eitt alment partafelag at byggja og reka. Tí er tað ábyrgdin hjá felagnum at kanna og meta um fyrimunir og vansar við at leggja skuldina um.

Tunnilsfelagið hevur upplýst, at tað metir ikki, at tað er ein fyrimunur at leggja skuldina um í verandi løtu. Sambært felagnum hevði tað verið kostnaðarmikið at sagt verandi skuld upp og síðani at lagt hana um. Í øðrum lagi er ivasamt, um felagið hevði fingið lagaligari fígging við fastari rentu. Váðin við broytiligari rentu er mettur at vera ov stórur. Í triðja lagi er verkætlanin ikki liðug, og tí er byggiváði framvegis tengdur at verkætlanini. Hartil eru inntøkurnar nakað lægri enn tað, sum mett varð frammanundan. Hetta merkir, at samlaða verkætlanin helst hevur nakað lægri kredittvirði nú sammett við síðst í 2016, tá ið felagið gjørdi avtalurnar um fígging. Tí er ætlanin ikki í løtuni at kanna møguleikan nærri at umfíggja skuldina.

Til nr. 3
Sambært felagnum er størsta forðingin fyri at umfíggja tunlarnar í løtuni kostnaðurin, sum knýtir seg at tí at siga upp skuldina og at umfíggja hana. Harafturat er samlaða verkætlanin ikki liðug enn, og byggiváði er framvegis knýttur at verkætlanini. Hetta ger tað sera ivasamt, um felagið í løtuni hevði fingið aðra fígging, sum er lagaligari enn verandi fígging.

Tinganes, 13. oktober 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum